ar, at makrelurin er besta boðið, um avtalan við russar skal haldast á einum líkinda støði.

– Men her eru vit í teirri støðu, at vit í løtuni ikki vita, hvussu stórur okkara partur av makrelinum verður, tí enn eru samráðingarar millum strandalondini ikki komnar á mál.

Hann vísir á, at nýggjar samráðingar verða um býtið av heildarkvotuni av makreli í Oslo hin 27. november, men at ógjørligt er at siga longu nú, um hesar samráðingar fara at bera á mál.

– Tað positiva er, at ICES sigur makrelstovnin vera sera væl fyri, og hóast veiðan í ár hevur verið størri, enn felagsskapurin mælti til, metir ICES tó framvegis, at 640.000 tons kunnu fiskast í 2011. Tilmælta heildarkvotan komandi ár verður soleiðis nakað størri enn í ár, leggur hann aftrat.

### Stórur áhugi

Spurningurin er so, hvussu stórur føroyski parturin av heildarkvotuni verður, og hvussu nógv av hesum kann takast burtur úr til at keypa tosk úr Barentshavinum fyri.

– Vit hava skilt, at russar hava stóran áhuga fyri makreli, nú lítið og einki er av svartkjafti, men hvussu nógvan makrel Føroyar kunnu lata í býti við tosk, veldst sjálvsagt um, hvussu stórur okkara partur verður, sigur landsstýrismaðurin.

Jacob Vestergaard sigur, at neyvan verður nøkur løtt loysn í samráðingunum við russar, og spurningurin er sjálvandi eisini, um støðið í kvotuni skal haldast á tí støði, tað er.

– Í seinastu samráðingum við russar fyrst í hesum árinum fingu Føroyar væl burtur úr teimum seinastu tonsunum av makreli, sum vit lótu russum. Í løtuni vita vit ikki, hvussu »svangir« russar eru, og tað kann bert tíðin fara at vísa, nú samráðingar verða um tvær vikur.

### Stóran týdning

Landsstýrismaðurin ásannar, at nú fundur skuldi verða í morgun við umboð fyri uppisjóvarflotan og teir, sum umboða flakatrolararnar, verður tað kortini altíð upp til myndugleikarnar í londunum at gera av, hvussu býtið – og lutfallið í býtinum – verður millum londini.

– Men vit í landsstýrinum vilja gjarna hoyra sjónarmiðini hjá vinnuni, sum er partur av hesum máli, áðrenn farið verður til samráðingarborðið, sigur landsstýrismaðurin.

Jacob Vestergaard sigur, at nógv tann størsti parturin av toskinum, sum Føroyar kunnu fiska í Barentshavinum, eru í avtaluni við Rusland.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Ísfiskaskip og fiskimenn, sum fiska undir Føroyum, vilja eisini hava lut í makrelveiðini í komandi ári*

# Ísfiskaflotin heldur fast

**RÆTTINDI – Eg havi einki hoyrt um, at ísfiskaflotin ætlar sær at seta fram nøkur krøv um rættindi, sum reiðaríir fingu í ár, nú føroyska makrelkvotan gjørdist so stór, sigur Jacob Vestergaard**

Vilmund Jacobsen

Tá landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, í summar gjørdi av at lata ísfiskaskipum nøkur túsund tons av makreli, nú Føroyar ásettu sær eginkvotu fyri 2010, vóru røddir í uppisjóvarvinnuni, sum søgdu seg stúra fyri, at ísfiskaskipini ikki fóru at vilja sleppa hesum rættindum aftur.

Sosialurin hevur eisini skilt, at tað eru reiðaríir, sum eiga ísfiskaskip, ið hava hug til at gera sína støðu til kennar, nú samráðingar við russar stunda til, og væntandi er, at Føroyar noyðast at lata makrel í staðin fyri svartkjaft í býti við russar.

Ein av teimum, sum hevur hug til at gera viðmerkingar til hetta mál, er Marner Lisberg, reiðari, men hansara sjónarmið verða ikki í Sosialinum fyrr enn fríggjadagin.

### Einki hoyrt

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur seg hinvegin einki hava hoyrt um, at reiðaríir, sum varða av ísfiskaskipum, ið sluppu at fiska makrel í ár, nú ætla at halda fast um hesi rættindini.

– Vit komu í eina serstaka støðu í ár, tá vit ikki kundu semjast við hini strandalondini um býtið av makrelinum og tískil gjørdu av at áseta okkum eginkvotu. Hetta gav okkum nakrar møguleikar, sum vit ikki hava havt áður. Hvussu verður í komandi ári, kunnu vit einki siga um í løtuni, nú samráðingarnar milllum londini um býtið ikki eru lidnar enn.

Jacob Vestergaard ásannar, at tað var ein spennandi roynd at lata ísfiskaskip fiska makrel í ár, men hann ásannar eisini, at hann eingi sum helst lyfti kann geva um, hvussu verður við hesum í komandi ári.

– Nú mugu vit fyrst síggja, hvat úrslitið verður av samráðingunum millum strandalondini, og hvussu stórur okkara partur av heildarkvotuni verður, tá samanum kemur, sigur landsstýrismaðurin.





## Sjóndepilin søkir eftir handverksvegleiðara til verkstað fyri blind og sjónveik

**Krav til persónligar førleikar:**
Jalig (ur), lætt lyndi, tolin, nýskapandi og evnir at læra frá sær ymiskt handaligt arbeiði. Virkisroyndir og royndir at arbeiða við fólki hava fyrimun. Arbeiða sjálvstøðugur og í toymi í dagliga virkseminum á stovninum.

**Krav til fakligar førleikar:**
Skipa dagliga arbeiðið á træverkstaðnum við ymiskum ídnaðarmaskinum og øðrum handamboðum.

**Útbúgving:** Handverkari, Snikkari ellar annar fakbólkur við pedagogiskum og handaligum frálæruevnum.

Telduførleiki til vanligt samskifti.

**Sjóndepilin bjóðar:**
- Fakliga frálæru um sjón og sjóntrupulleikar – atlit og arbeiðshættir.
- Upplæran innan fakøkið.
- Eitt spennandi og avbjóðandi starv.

Starvið er fulltíðarstarv og setunarviðurskiftini eru sambært avvarandi sáttmála, sum er galdandi fyri økið.

Starvið verður sett frá 1. januar 2011. Eru fyrispurningar, kunnu tit ringja til Sjóndepilin tlf. 31 82 24 og spyrja eftir deildarleiðaranum.

**Skrivlig umsókn við prógvum og CV skal vera okkum í hendi mikudagin 24. nov. 2010.**
**Adr.: Sjóndepilin, att. leiðarin**
**Boks 2074, FO-165 Argir**

**Fakta um Verkstaðin:**
Verkstaðurin er deild undir Sjóndeplinum. Húsið verður rikið sum sjálvstøðug eind og liggur í miðbýnum í Havn. Brúkararnir, sum eru sjónveikir, eru eisini lættari seinmentir. Dagliga eru 2 starvsfólk knýtt at húsinum og onnur fakfólk koma til ávísar dagar og uppgávur.

Á Verkstaðnum er vart arbeiði á træverkstaði, ymiskt handaligt arbeiði, arbeiði í køki, sosial tiltøk, tiltøk í býnum, einsæris ella í bólki. Pláss er fyri uml. 10 viðskiftafólkum.
Málið er at geva ein gerandisdag við virðiligum uppgávum og mennandi innihaldi.

## Sjóndepilin søkir eftir ítrívsvegleiðara

Søkt verður eftir ítrívsvegleiðara ella øðrum fakbólki við handaligum og pedagogiskum evnum í eitt farloyvisstarv í 4 mánaðar at byrja 1. januar 2011.

Sjóndepilin hevur tríggjar sjálvstøðugar eindir: Ráðgevingin, Dagtilhaldið og Verkstaðurin.

Starvsfólkið søkt verður eftir kemur í samstarvi við onnur at hava ábyrgd av tí handaliga virkseminum á Dagtilhaldinum.

**Endamálið við Dagtilhaldinum er:**
- at menna og stuðla blindum og sjónveikum sálarliga og sosialt
- at blind og sjónveik fáa sjálvsvirði av innihaldsríkum virksemi
- at virksemið verður lagt til rættis eftir ynski og førimuni hjá teimum blindu og sjónveiku

Eisini kemur viðkomandi at starvast á Verkstaðnum við handaligum og sosialum uppgávum.
Brúkararnir her eru sjónveikir og lættari seinmentir.

**Krav til fakligar førleikar:**
- útbúgvin ítrívsvegleiðari e.l.
- útbúgvin innan ymiskt handverk ella hondarbeiði
- telduførleiki til vanligt samskifti

**Krav til persónligar førleikar:**
- jalig(ur)og tolin
- hevur hugflog og evnir at læra frá sær ymiskt handaligt arbeiði,
- góð samstarvsevnir og ert fyrikomandi
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og ert málsøkin

**Sjóndepilin bjóðar:**
- fakliga frálæru um sjón og sjóntrupulleikar – atlit og arbeiðshættir.

Starvið er 35 tímar og setunarviðurskiftini eru sambært avvarandi sáttmála, sum er galdandi fyri økið.

Ynskiligt er, at starvið verður sett skjótast gjørligt. Skrivlig umsókn við prógvum og CV skal vera okkum í hendi mikudagin 24. nov. 2010.

**Umsóknir skulu sendast til:**
**Sjóndepilin**
att. leiðarin
boks 2074
FO-165 Argir

*Eru fyrispurningar, kunnu tit ringja á tlf. 31 82 22 og spyrja eftir deildarleiðaranum.*